# Eg var í størstu neyð men fekk onga hjálp

**Landssjúkrahúsið segði rætt og slætt kortanei til at senda hjálp til 77 ára gamla konu, sum var dottin og hevði meiðslað seg**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Á Landssjúkrahúsinum søgdu tey ikki bara "nei" Tey søgdu "kortanei" til at senda sjúkrabil eftir eini eldri konu, sum hevði brotið knæið. Og tað fyrsta hon fekk at vita, tá ið hon loksins kom á Landssjúkrahúsið, var, at her slapp hon ikki at vera leingi*

– Eg var í størstu neyð, men eg fekk onga hjálp frá Landssjúkrahúsinum.

Karl Poulsen í Havn er ógvuliga vónbrotin av teirri viðferð, hann fekk á Landssjúkrahúsinum, tá ið hann hevði brúk fyri hjálp.

Tí fegnast hann um, at ljóskastarin nú er varpaður á tænastuna, sum Landssjúkrahúsið veitir og hann vónar tískil, at okkurt gott fer at spyrjast burturúr tí, at Bill Justinussen, løgtingsmaður, nú hevur reist málið í Løgtinginum, har hann fer at spyrja landsstýrismannin um Landssjúkrahúsið.

Sjálvi komu Karl og konan rættiliga illa fyri ein dagin fyri tveimum árum síðani.

Konan var tá 77 ára gomul og sjálvur var hann 75 ára gomul, Tá ið hetta fór fram.

– Ein dagin vildi so illa til, at konan datt og breyt knæið. Eg skundaði mær at ringja á Landssjúkrahúsið at fáa hjálp.

### Søgdu kortanei at senda sjúkrabil

Hann sigur, at hann minnist, at fyrr tá ið hann arbeiddi, og onkur meiðslaði seg, plagdu tey at ringja eftir sjúkrabilinum og so kom hann beinanvegin. So hann trúði at tað var tað sama enn.

– Men hesuferð, eg ringdi var øðrvísi.

– Á Landssjúkrahúsinum søgdu tey ikki bara "nei", men tey søgdu enntá "kortanei" til at senda sjúkrabil.

– Eg spurdi, hvat eg so skuldi gera? Jú, eg mátti fáa fatur á kommunulæknanum.

– Eftir at hava ringt ymsa staðir, fekk eg so fatur á einum lækna og greiddi honum frá støðuni. Tá ið eg hevði greitt honum frá, segði hann, at hann skuldi senda sjúkrabilin eftir konuni.

– Sjúkrabilurin kom beinanvegin og tað var ein stórur uggi fyri meg, at portørarnir vóru serstakliga fittir og hjálpsamir.

Men komin á Landssjúkrahúsið, var tónin øðrvísi.

– Tað fyrsta, konan fekk fekk greið boð um á Landssjúkrahúsinum var frá eini sjúkrasystir, sum segði: Eitt skulu vit siga tær, at her sleppur tú ikki at vera leingi!

– Eg varð í dýrastu neyð, tí eg orkaði ikki at hjálpa konuni heima og bønaði eg ein lækna um ikki at senda hana heim. Læknin var eisini fittur og fyrikomandi og segði, at hon skuldi liggja á sjúkrahúsinum fyri fyrst.

– Men ein dagin, fimm ella seks dagar seinni, kemur ein sjúkrasystir til konuna og biðjur hana gera seg kláran tí hon skal heim.

Hon varð koyrd í ein sjúkrabil og so var koyristólur og onnur útgerð grýtt í bilin og so varð konan koyrd heim.

– Hon segði, at Landssjúkrahúsið hevði sagt, at tey skuldu syrgja fyri heimahjálp og tað hjálpti eitt sindur upp á støðuna.

Men allur dagurin gekk og kvøldið við og tað kom so hartil, at konan vildi sleppa at leggja seg, men har var framvegis ongin heimahjálp komin.

Men nú bar tað so á, at ein sjúkrarøktarfrøðingur gekk til grannan um kvøldið og eg ansaði eftir tá ið hon kom og so fór eg inn til grannan at kæra mína neyð fyri henni.

– Hon var ómetaliga fitt og hjálpti okkum, so at konan slapp í song.

Karl Poulsen sigur, at morgunin eftir kom heimahjálpin.

– Men tað var ikki tí at Landssjúkrahúsið hevði syrgt fyri tí. Tað var tí at sjúkrarøktarfrøðingurin hjá grannanum hevði syrgt fyri tí.

Hann sigur, at tað hevur hjálpt upp á støðuna, men hann sigur framvegis, at konan varð útskrivað alt ov tíðliga

Eisini Karl Jacobsen staðfestir, at tað er rættiliga nógv broytt frá fyrr í tíðini, tí tað vóru sjúklingarnir viðfarnir við nógv størri umsorgan, enn teir verða nú.

– Tað er sum ein sjúkrarøktarfrøðingur á Landssjúkrahúsinum helt fyri við meg: Her er ikki brúk fyri sjúkum fólki, sigur Karl Poulsen.

Tí heldur hann lítið um tað viðferð, sum fólk fáa í Føroyum, tá ið illa vil til.

# Mátti sita í fleiri tímar í náttkjóla og bíða eftir lækna

**Skóleys og í berum náttkjóla varð hon koyrd á Landssjúkrahúsið í sjúkrabili, men tey koyrdu hana heimaftur við brotnum ryggi**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað var eitt øgiliga óbehagiligt upplivilsi!

Soleiðis sigur ein kona um eina ferð á Landssjúkrahúsið sum sjúklingur einaferð fyrr í ár.

Hendan miðaldarliga konan úr høvuðsstaðarøkinum sigur, at vitjanin á Landssjúkrahúsinum kann samanfatast í eitt einasta orð.

Og tað er Líkasæla!

– Viðferðin, sum eg fekk á Landssjúkrahúsinum var merkt av eini líkasælu, sum var øgiliga óbehagilig, sigur konan, sum vil vera ónevnd, tí hon heldur, at leggur hon navn til, kann tað gera støðuna enn verri.

Nú Bill Justinussen ætlar at seta Landsstýrismanninum í heilsumálum nakrar hvassorðaðar spurningar um tænastustøðið um tænastuna á Landssjúkrahúsinum, hevur verið sóknast eftir dømum um vánaliga tænastu.

### Send heim við brotnum ryggi

Her er eitt dømi um, at ein sjúklingur hevur fingið viðferð, sum hon heldur er eyðmýkjandi fyri ein sjúkling.

Vit lata konuna sjálva greiða frá.

– Ein dagin nakað síðani var seg so óheppin at detta inni hjá mær sjálvum. Fallið var so meint, at eg kendi á mær, at okkurt brákaðist í rygginum. Eg fekk kortini strítst meg upp í seingina og har lá seg so í tveir dagar so still sum gjørligt, tí eg fekk illa rørt meg fyri pínu.



*- Í gjøgnumtrekki og ímillum nógv fólk sat eg skóleys og í berum náttkjóla og bíðaði eftir einum lækna, sum ongantíð kom Hóast eg var illa fyri og illa ílatin, vildi tey hava meg heim í hýruvogni og tað endaði við, at eg var send heim, hóast ryggurin var brotin. Savnsmynd*

– Eg bleiv við at hava líka ilt og so ringdu vit eftir lækna.

Læknin helt, at eg skuldi fara á sjúkrahúsið beinanvegin og sendi boð eftir sjúkrabilinum.

– Sjúkrabilurin kom so, men eftirsum eg fór beint úr seingini í sjúkrabilin, var eg ikki serliga væl ílatin. Sostatt var eg skóleys og í berum náttkjóla.

Konan sigur, at tað fyrsta, tey gjørdu, var at fáa hana í røntguna.

– Í røntguni vóru tey ómetaliga fitt og fyrikomandi men tá ið eg var liðug har, fekk eg boð um at fara oman í skaðastovuna at bíða, tí so skuldi ein lækni koma at tosa við meg beinanvegin.

Eg varð so trillað oman í skaðastovuna og setti meg at bíða.

– Men har sat eg so í samfullar fýra tímar, uttan at nakar lækni kom. Tá var eg rættiliga illa fyri, tí hurðin gekk og tað var trekkur og fólk kom og fór alla tíðina og har sat eg skóleys í berum náttkjóla.

– Tá ið eg hevði sitið nóg leingi, kravdi eg at fáa eina song at liggja í, tí eg varð blivin køld og eg helt ikki at tað var so spennandi at sita alment frammi í berum náttkjóla og skóleys.

Tá ið fýra tímar vóru farnir fóru vit at spyrja eftir læknanum, fekk eg at vita, at hann var farin heim.

– Síðani kom ein til mín og segði, at eg mátti heldur fara heim. Tað mótmælti eg, tí eg helt ikki, at eg kundi fara í ein hýruvogn, soleiðis sum eg var ílatin. Og tað endaði so við, at sjúkrabilurin kom heimaftur við mær.

Aftaná fekk hon so at vita, at ryggurin var brotnaður og hevði forskotið seg ein heilan sentimetur so tað mátti nógva geva pínu.

Hon endurtekur, at hon sostatt varð send til hús aftur av Landssjúkrahúsinum, uttan at nakar lækni hevði kannað hana ella tosað við hana.

Men hon minnir á, at hon varð innløgd við sjúkrabili og hon ivast í um tað tá yvirhøvur er lógligt at koyra hana til hús aftur, uttan at ein lækni hevur so frægt sum tosað við hana.

Hendan konan sigur, at tað er ómetaliga ringt at vera sjúkur, men at merkja slíka líkasælu afturat, er ógvuliga óbehagiligt, leggur hon afturat.

Tað, sum merkir sjúkrahúsið nú á døgum, er, at ongin vísir seg at hava tíð til nakað sum helst og enn minni hava tey stundir til at fara við sjúklingum sum menniskju, sigur hendan konan.

Tí fegnast hon um, at spurningurin nú verður reistur í Løgtinginum um tænastustøðið á Landssjúkrahúsinum, tí tað hevur stóran týdning, at hetta verður tikið upp.